Villleiðandi skelti:

# Hvussu skal ferðamaðurin finna til Klaksvíkar?




*Í Leirvík er einki skelti sum vísur til Norðoyatunnilin. Bilurin á myndini skal helst til Klaksvíkar*

*Myndir: Birgir Waag Høgnesen*

**FERÐAMANNALAND?**

Hjá ferðafólki sum koyra í Føroyum er ikki altíð so lætt at finna. Tey sum t.d. eru komin til Leirvíkar, og ætla sær til Klaksvíkar ella í Norðoyggjar, hava ikki nógvar møguleikar fyri at koma rætt fram, uttan at tey verða noydd at steðga øðrum bilum ella venda sær til fólk á staðnum fyri at fáa vegleiðing og hjálp, tí ongastaðni stendur, hvønn veg tey skulu koyra fyri at finna nýggja undirsjóvartunnilin.

mg.




*Skeltið og pílurin vísa, at talan er um eina ferjulegu*




*Komin oman á ferjuleguna sær gløggi ferðamaðurin, at hann kann koma til Syrðadals við at stilla seg í røð nr. 5. Møguliga sleppa tey til Klaksvíkar tann vegin. Syrðadalur er jú í Norðoyggjum*

# Amnesty: Vandi fyri at kreppan í Chad breiðir seg

Amnesty International hevur júst givið eina nýggja frágreiðing út, ið varpar ljós á týningina og hópdrápini í Chad, sum liggur við sudanska markið. Støðan í landinum er nú vorðin so álvarslig, at Amnesty metir stóran vanda vera fyri, at vápnaða kreppan breiðir seg um allan landslutin.

Amnesty International heitir tí á altjóða samfelagið um at leggja trýst á stjórnirnar í Chad og Darfur við tí endamáli at loyva friðarvarðveitandi ST-herliðum at verja íbúgvarnar í økinum. Frágreiðingin "Chad/ Sudan: Sowing the seeds of Darfur – Ethnic targeting in

Chad by Janawid militias from Sudan" varpar ljós á, hvussu vápnaðir fólkaherar ræða og fremja yvirgang móti íbúgvunum í Chad. Kanningarfólk hjá Amnesty hava seinastu mánaðirnar fingið áhaldandi fráboðanir um, hvussu íbúgvarí landsbygdunum báðu megin markið millum Sudan og Chad, verða dripnir, neyðtiknir og noyddir at flýggja. Álopini verða framd av Janjaweed-fólkaherinum, sum fær stuðul frá ymiskum etniskum bólkum í Chad.

Amnesty metir, at umleið 50.000-75.000 íbúgvar í Chad, síðani september 2005, eru riknir úr teirra landsbygdum mótvegis flóttafólkalegum longri inni í landinum. Amnesty Interantional metir somuleiðis, at tað eru umleið tvær milliónir flóttafólk í landslutinum, orsakað av vápnaðu kreppuni í Darfur, og at umleið 85.000 fólk eru deyð síðani 2003.

Bæði trygdarráðið hjá ST og Afrikanska Samveldi viðgera í løtuni støðuna í Darfur, og Amnesty International mælir í hesum sambandi til, at báðir felagsskapir leggja stórt trýst á stjórnirnar í Sudan og Chad um at loyva altjóða friðarvarðveitandi herliðum inn í økið at verja íbúgvarnar. Hvørki stjórnin í Sudan ella Chad hava megnað at vart íbúgvarnar móti vápnaðu fólkaherunum, og tískil er neyðugt, at ST fær møguleika at bøta um støðuna, áðrenn hon gerst alsamt verri.

Amnesty International mælir millum annað til:

- At stjórnin í Chad verjir íbúgvarnar í raktu økjunum og biður um altjóða hjálp við tí endamáli at økja um trygdina hjá flóttafólki og íbúgvum, sum eru hótt av nýggjum álopum.
- At ST og Afrikanska Samveldi leggja trýst á stjórnina í Sudan um at góðtaka friðarvarðveitandi ST-tiltøk og fyriskipa tiltøk við tí endamáli at steðga vápnaðum fólkaherum at taka seg inn í Chad.
- At ST setir friðarvarðveitandi tiltøk í verk í Darfur við tí endamálið at verja íbúgvarnar í grannalandinum í samstarvi við myndugleikarnar í Chad.
- Ataljóðasamfelagið útvegar Afrikanska Samveldinum neyðugu politisku og fíggjarligu hjálpina, so møguleikarnir hjá Afrikanska Samveldinum at veita íbúgvunum trygd, verða styktir.
- At ST stovnar eitt ráð, sum skal kanna álopini í Chad og almannakunngera niðurstøðurnar og tilmælini.

Frágreiðingin kann lesast á:
http://web.amnesty.org/library/Index/ENGAFR200062006?open&of=ENG-TCD